HAGSTOVA FØROYA

# Búskaparískoytið stavandi frá vitjandi ferðafólki 2011 til 2016

28.05.2018

# INNIHALD

1 Setningur .......... 2
2 Kanningarúrslit .......... 3
3 Kanningarháttur .......... 6
4 Respondent-bólkar .......... 7
5 Hugtøk .......... 8

# 1 SETNINGUR

Hagstova Føroya ger, eftir umbøn frá Visit Faroe Islands, árliga kanning av, hvussu stórur umsetningurin og talið av ársverkum eru, ið stava frá viðskifti við ferðafólk, sum vitja Føroyar í einum ávísum ári.

Við støði í svarum til spurningar, ið verða settir til úrvaldan skara av fyritøkum, sum verða mett at hava viðskifti við vitjandi ferðafólk, verður eisini estimat gjørt av bruttovirðisøking av skapta virkseminum frá innkomandi ferðavinnuni.

# 2 KANNINGARÚRSLIT

Viðgerð av innkomnum svarum til spurningin um í hvønn mun umsetningurin hjá fyritøkuni verður mettur at stava frá vitjandi ferðafólki vísir, at umsetningurin í 2016 verður estimeraður at hava verið 606 mió. kr. Hetta er ein vøkstur á 6,7% í mun til estimeraða umsetningin í 2015 á samanlagt 568 mió. kr. og minsti árligi vøksturin, ið er estimeraður í kanningunum higartil.




Umsetningurin (søluvirði) við sølu av vørum og tænastum til vitjandi ferðafólk er ein deilmongd ferðajavnanum í gjaldsjavnanum og kann tískil berast saman við samlaða útflutningsvirðið av vørum og tænastum. Seinasta uppgerðin av gjaldsjavnanum er til og við 2012, men framrokningar/metingar eru gjørdar fyri eftirfylgjdandi ár. Estimeraði umsetningurin fyri innkomandi ferðavinnuna er í mun til framroknaða útflutningsvirði í 2016 6,4%

## Umsetningur frá vitjandi ferðafólki/innkomandi ferðavinnu

Estimerað fyri árini 2011 til 2016 og lýst í mun til samlaða útflutningsvirðið

| Milliónir krónur | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Umsetningur frá innkomandi ferðavinnu í alt** | **384** | **421** | **460** | **523** | **568** | **606** |
| Flutningsfeløg, cruisevinna og ferðaskrivstovur | 285 | 309 | 330 | 351 | 369 | 398 |
| Gistingar og annað hotelvirksemi | 34 | 37 | 43 | 67 | 74 | 75 |
| Matstovur, matvøruhandlar og drykkjuvørur | 38 | 41 | 48 | 49 | 53 | 60 |
| Flutningur innanlands og leiga av bili | 13 | 15 | 19 | 26 | 37 | 40 |
| Upplivingar og aðrir aktivitetir | 8 | 13 | 14 | 17 | 20 | 18 |
| Klæðir og fótbúnaður | 3 | 4 | 6 | 9 | 9 | 10 |
| Onnur søla | 1 | 2 | 2 | 4 | 6 | 6 |
| **Útflutningur av vørum og tænastum *** | **6.511** | **6.654** | **7.433** | **8.063** | **8.313** | **9.521** |
| **Umsetningur frá ferðafólki ímt til útflutning í alt **** | **5,9%** | **6,3%** | **6,2%** | **6,5%** | **6,8%** | **6,4%** |

Viðm: * Úflutningurin av vørum og tænastum er gjørdur upp sum partur av gjaldsjavnanum av Hagstovuni til og við 2012. Búskaparráðið og Hagstovan hava í felag greinað búskaparlig viðurskifti (útgáva 1. mars 2018) og ásett fortreytir til framrokning av samlaða útflutningsvirðinum til og við 2016.
** Umsetningurin (søluvirði) við sølu av vørum og tænastum til vitjandi ferðafólk er ein deilmongd av ferðajavnanum í gjaldsjavnanum og kann tískil berast saman við samlaða útflutningsvirðið av vørum og tænastum

Kelda: Hagstova Føroya

Tal av ársverkum í 2016 verður fyri bólkin av fyritøkum samanlagt estimerað til 607. Í 2015 vórðu ársverkini fyri sama vinnugreinabólk estimerað til 524, sostatt eru umleið 80 fleiri ársverk í 2016 í mun til 2015, ið kunnu knýtast til vitjandi ferðafólk.

## Ársverk frá vitjandi ferðafólki/innkomandi ferðavinnu

Estimerað fyri árini 2011 til 2016




Kelda: Hagstova Føroya

Við støði í roknskapartilfarið fyri tær fyritøkurnar, ið hava svarað spurningum til kanningina, verður bruttovirðisøkingin fyri hesar eindir estimerað. Kanningarúrslitið

kemur til, at bruttovirðisøkingin samanlagt fyri hesar fyritøkur øktist við 6,5% í 2016 samanborið við 2015.




Hagstovan framleiðir árliga uppgerð av bruttovirðisøking býtt sundur á vinnugreinar, og kann estimatið fyri bruttovirðisøking í hesari kanningini berast saman við uppgerð av sama í tjóðarroknskapi. Henda samanberingin vísir, at **búskaparliga ískoytið í 2016 frá innkomandi ferðavinnu til samantaldu virðisskapanina var tvey prosent**.

**Bruttovirðisøking frá vitjandi ferðafólki/innkomandi ferðavinnu**

Estimerað fyri árini 2011 til 2016

| Milliónir krónur | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Bruttovirðisøking frá vitjandi ferðafólki í alt** | **165** | **171** | **193** | **226** | **297** | **316** |
| Flutningsfeløg, cruisevinna og ferðaskrivstovur | 114 | 119 | 132 | 143 | 201 | 208 |
| Gistingar og annað hotelvirksemi | 18 | 19 | 22 | 33 | 40 | 45 |
| Matstovur, matvøruhandlar og drykkjuvørur | 20 | 21 | 25 | 26 | 29 | 34 |
| Flutningur innanlands og leiga av bili | 7 | 7 | 8 | 13 | 10 | 14 |
| Upplivingar og aðrir aktivitetir | 4 | 4 | 5 | 7 | 10 | 8 |
| Klæðir og fótbúnaður | 1 | 1 | 1 | 3 | 4 | 4 |
| Onnur søla | 0 | 1 | 1 | 1 | 3 | 3 |
| **Bruttovirðisøking samanlagt smb. tjóðarroknskapi *** | **11.606** | **11.943** | **12.985** | **13.918** | **14.770** | **15.890** |
| **Bruttovirðisøking vitjandi ferðafólk ímt til búskapin í alt** | **1,4%** | **1,4%** | **1,5%** | **1,6%** | **2,0%** | **2,0%** |

Viðm: * Bruttovirðisøkiningin samanlagt er fyri árini til og við 2015 gjørd upp sum partur av tjóðarroknskapinum av Hagstovuni. Búskaparráðið og Hagstovan hava í felag greinað búskaparlig viðurskifti (útgáva 1. mars 2018) og ásett fortreytir til framrokning av 2016.

Kelda: Hagstova Føroya

# 3 KANNINGARHÁTTUR

Hagstovan sendir spurnablað til umleið 350 útvaldar fyritøkur, sum við støði í vinnugreinaskipanini fyri ávísar tænastuvinnur, verða mettar at hava beinleiðis viðskifti við vitjandi ferðafólk. Fyritøkurnar verða spurdar fylgjandi spurningar:

**Spurningur 1:** Umsetningurin í alt uttan MVG?

**Spurningur 2:** %-vísur partur av umsetninginum, sum stavar frá keypi hjá útlendingum?

**Spurningur 3:** Tal av ársverkum í fyritøkuni?

Í teimum førum svar ikki fæst til spurnablaðið, verður ringt til fyritøkuna.

Tá hvørki skrivligt ella munnligt svar er fingið til vega, verður, um møguligt, manglandi svar estimerað í mun til vitan, sum annars kann útvegast, m.a. roknskapartøl fyri sama ella onnur ár.

Umsetningur í samband við viðskifti við vitjandi ferðafólk, ið fæst til vega við støði í hesari kanningini, kann ikki beinleiðis samanberast við hugtøk í tjóðarroknskapinum. M.a. fevnir uppgerðin av ferðajavnanum í gjaldsjavnanum um meira enn viðskifti við vitjandi ferðafólk, men estimatið av umsetninginum frá innkomandi ferðavinnu í hesari kanningini er ein deilmongd av útflutningsvirðinum í ferðajavnanum. Tískil kann umsetningurin í hesari kanningini berast saman við samanlagda útflutningsvirði.

Svar til settar spurningar um umsetning verða samanborin við samsvarandi hugtøk í skattaroknskapum fyri somu fyritøku, har staðfest verður, hvussu stór samlaða bruttovirðisøkingin er í fyritøkuni.

Til estimering av bruttovirðisøking og tal av ársverkum, verður nýtt sama lutfall sum millum samlaðan umsetning og umsetning frá innkomandi ferðavinnu.

Óvissa er altíð í slíkum kanningum og mett verður, at tað er ikki møguligt at kvantifisera óvissuna. Útgangsstøðið í kanningini er, at respondent-bólkurin fevnir um allar eindir, ið hava viðskifti við vitjandi ferðafólk. Óvissan um partin av umsetninginum frá innkomandi ferðavinnu liggur millum annað í meting hjá heimildarfólki um, hvør er eitt vitjandi ferðafólk, men eisini í metingini hjá heimildarfólki um, hvussu stórur partur av umsetninginum stavar frá sølu til vitjandi ferðafólkini. Tá so hetta lutfall verður brúkt í estimeringini av virðisøkingini, verður óvissan enn størri. Óvissan um ársverkini liggur millum annað í, at respondenturin kann ivast í, hvørt eitt ársverk skal hava støðið í lønarupphædd ella tali av fulltíðarstørvum.

# 4 RESPONDENT-BÓLKAR

Talið av fyritøkum, ið fáa sendandi spurnablað, er umleið 350 til hvørja kanning.

Fyritøkurnar verða í hesari kanningini bólkaðar í 7 ymsar bólkar:

1. **Millumlandaflutningsfeløg, cruisevinna og ferðaskrivstovur** fevnir um millumlandaflutningsfeløg, agentar og havnarskrivstovur, ið hava samband við cruisevinnu, umframt flogvøllin og ferðaskrivstovur. Umsetningur fevnir um ferðaseðlar og tax-free sølu. Agent-fee og tænastuveitingar frá føroyskum havnum til útlendsk cruisereiðarí umframt tænastuveitingar til útlendsk flogfeløg, ið nýta flogvøllin.

2. **Gistingar og annað hotelvirksemi** fevnir um virksemi í samband við gisting á hotellum, vallaraheimum, summarhús (kunningarstovurnar), kamping, tjalding og ból og bitið. Afturat hesum er eisini íroknað annað virksemi á hotellum, t.d. útleigan av fundarhølum, matur og drekka úr matstovuni við meira. Sjálvstøðugar matstovur, sum feløgini, ið reka hotelvirksemi eiga heilt ella partvís, eru at finna í bólki 3.

3. **Matstovur, matvøruhandlar og drykkjuvørur** fevnir um matstovur, matstøð, kaffistovur, vertshús, matvøruhandlar og rúsdrekkasølu.

4. **Flutningur innanoyggja og leiga av bili** fevnir um hýruvognsflutning, bygdaleiðir og strandferðslu. Tunnilsgjøld, bensinstøðir og útleigan av bilum til vitjandi ferðafólk eru eisini í hesum bólkinum.

5. **Upplivingar og aðrir aktivitetir** fevnir um bygdasøvn, søvn landsins, og virksemið hjá teimum, ið skipa fyri útferðum á sjógvi og landi, t.v.s. bussferðir í samband við útferðir, umbidnar av ferðamannaskipum.

6. **Klædnavørur og fótbúnaður**

7. **Onnur søla** fevnir um aðrir handlar, millum annað bókhandlar, ur- og gullsmiðir, optikarar og onnur, ið kunnu hugsast at hava viðskifti við vitjandi ferðafólk.

# 5 HUGTØK

*Ferðing og ferðavinna*
**Ferðing** (á enskum travel) viðvíkur virksemi hjá ferðandi (á enskum traveller).

**Ferðavinna** (á enskum tourism) viðvíkur virksemi hjá vitjandi (á enskum visitor). Ferðavinna fevnir um virksemi hjá vitjandi, ið gera ein túr (á enskum trip) til eitt megin-ferðamál uttanfyri sítt vanliga umhvørvi í eitt tíðarskeið, sum er minni enn eitt ár, uttan mun til endamál, m.a. vinnuligt, frítíðar ella annað persónligt, tó verður arbeiðstøka hjá einum vitjandi hjá innlendis arbeiðsgevara í tíðarskeið styttri enn eitt ár ikki tikið við.

→ Ferðavinna er ein deilmongd av ferðing.

→ Ferðavinna fevnir um bæði frítíð og vinnulig endamál

→ Ferðavinna fevnir um vitjandi, sum bæði liggja nátt og tey, ið fara víðari sama dag (á enskum excursionists)

*Ferðandi og vitjandi*
Ein **ferðandi** er ein persónur, ið flytur seg millum ymisk geografisk støð uttan mun til endamál og tíðarlongd.

Ein **vitjandi** er ein ferðandi, ið ger ein túr til eitt megin ferðamál uttanfyri hansara/hennara vanliga umhvørvið í tíðarskeið styttri enn eitt ár við einhvørjum endamáli (vinnuligt, frítíð ella annað persónligt), undantikið er endamálið at arbeiða hjá einum innlendis arbeiðsgevara.

→ Vitjandi eru ein deilmongd av ferðandi

*Ferðafólk, vitjandi í ein dag og innkomandi ferðavinnan*
Ein vitjandi (innlendis, innkomandi ella útgangandi) verður bólkaður sum **ferðafólk** (á enskum tourist) um hansara/hennara túrur telur meira enn eina nátt, annars verður viðkomandi bólkaður sum **vitjandi í ein dag** (á enskum same-day visitor/excursionist).

→ Ein yvirnátting skilir munin millum eitt ferðafólk og ein vitjandi í ein dag

→ Av tí at ferðavinna viðvíkur virksemi frá vitjandi fevna ferðavinnuhagtøl um bæði ferðafólk og tey ið vitja í ein dag

**Innkomandi ferðavinnan** fevnir um virksemi frá vitjandi ferðafólki úr øðrum londum (frá einum degi til í mesta lagi eitt ár) við bæði vinnuligum, frítíðar og øðrum privatum endamáli.

*Umsetningur, ársverk og bruttovirðisøking*
**Umsetningur** er søluvirðið av vøru og tænastu uttan meirvirðisgjald. Umsetningurin (søluvirði) við sølu av vørum og tænastum til vitjandi ferðafólk er ein deilmongd

ferðajavnanum í gjaldsjavnanum og kann tískil berast saman við samlaða útflutningsvirðið av vørum og tænastum.

**Bruttovirðisøkingin** (á enskum Gross Value Added) er virðisøkingin í framleiðslu av vørum og tænastum í eitt ávíst tíðarskeið (vanliga eitt ár) máta í støðisprísum og verður gjørd upp eftir vinnugreinum. Bruttotjóðarúrtøkan (á enskum Gross Domestic Product) mátar somu virðisøking, tó við støði í marknaðarprísum, verður ikki gjørd upp eftir vinnugreinum.

Eitt **ársverk** svarar til eitt fulltíðarstarv. Tvey hálvtíðarstørv eru harvið eitt ársverk.

HAGSTOVA FØROYA
KVÍGGJARTÚN 1 • POSTRÚM 2068 • FO-165 ARGIR